# Hava drúgvar royndir við tunlum

**– Vit eru von við tunlar í okkara øki. Vit hava sjey aðrar tunlar í Norðoyggjum, sum vit hava havt í millum 20 og 40 ár. Hesar tunlar hava vit røkt, og hvørja ferð tað eru hendir skaðar í hesum tunlar, hevur Klaksvíkar Sjúkrahús tikið sær av teimum, sigur Jákup Petersen, leiðandi yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, nú tað bara eru mánaðir til enn ein tunnil letur upp í Norðoyggjum**

NORÐOYATUNNIL

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Gongur tað sum ætlað, letur Norðoyatunnilin upp í mai mánaði næsta ár. Nógv verður gjørt burtur úr trygd og tilbúgving í sambandi við tunnilin, og Klaksvíkar Sjúkrahús verður eisini partur av hesari tilbúgving.

Har verða tey ikki tikin av fótum av einum nýggjum tunli.

– Vit eru von við tunlar í okkara øki. Vit hava sjey aðrar tunlar í Norðoyggjum, sum vit hava havt í millum 20 og 40 ár. Hesar tunlar hava vit røkt, og hvørja ferð tað eru hendir skaðar í hesum tunlar, hevur Klaksvíkar Sjúkrahús tikið sær av teimum, sigur Jákup Petersen, leiðandi yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Tað er nógv ferðsla í teimum gomlu og smølu tunlunum, sum eru í Norðoyggjum, og tað hava gjøgnum tíðirnar verið vanlukkur í hesum tunlum.

– Tað koyra næstan túsund bilar ígjøgnum teir báðar tunlarnar úr Klaksvík og norður til Árnafjørð, Hvannasund og hinar bygdirnar, og har eru hendar nógvar vanlukkur gjøgnum árini.

– Klaksvíkar Sjúkrahús hevur verið við til at tikið sær av hesum skaðum, prioritera og diagnostisera. Vit hava sortera sjúklingar, gjørt av hvør skal sendast heim, hvør skal leggjast inn í Klaksvík, hvør skal sendast til Landssjúkrahúsið, og hvør skal sendast til Ríkissjúkrahúsið. Hetta hevur riggað væl, heldur Jákup Petersen.

## Nógv betur tunnil

Norðoyatunnilin verður gjørdur við nýggjastu tøkni, og hann verður nógv betur at koyra í, enn hinir gomlu tunlarnir í Norðoyggjum.

– Nú kemur tunnil nummar átta. Hetta verður ein tunnil, sum endar inni í sjálvari Klaksvíkini, og tí verður tað tann nærmasti tunnilin hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, vit hava minni enn fimm minuttir at koyra til tunnilin, sigur Jákup Petersen.

– Vit hava praktiskar royndir við skaðum, sum eru hendir í tunlum, og Norðoyatunnilin hevur tí onga stórvegis broyting við sær fyri okkara sjúkrahús. Norðoyatunnilin er hinvegin nógv tryggari enn hinir tunlarnir, og hann verður eisini nógv léttari at arbeiða í, skuldi nakað hent, sigur hann.

# Sjúkrahús við 11.000 nýggj

**– Tað mest spennandi við Norðoyatunlinum er, at Klaksvíkar Sjúkrahús fær 11.000 nýggjar borgarar sum sínar nærmastu grannar, sigur Heri Ellingsgaard, sjúkrahúsleiðari. Klaksvíkar Sjúkrahús fyrireikar seg til at veita enn fleiri tænastur til enn fleiri fólk, eftir at Norðoyatunnilin er latin upp**

SJÚKRAHÚS

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Teir báðir pólsku skurðlæknarnir undir ein skurðviðgerð á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í síðstu viku. Leiðandi yvi Sjúkrahúsi fer at økjast næstu árini*

Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi rokna tey ikki við skerjingum ella niðurleggingum, tá ið Norðoyatunnilin letur upp næsta ár. Hinvegin fyrireikar sjúkrahúsið í Norðoyggjum seg til at veita sínar tænastur til enn fleiri fólk.

– Vit fáa 11.000 fólk afturat sum okkara nærmastu grannar, og tað verður spennandi fyri Klaksvíkar Sjúkrahús. Vit fyrireika okkum til, at enn fleiri eysturoyingar koma at brúka okkara sjúkrahús, sigur Heri Ellingsgaard, sjúkrahúsleiðari.

– Vit hava styrkt læknamanningina við tveimum skurðlæknum í føstum starvi, umframt at vit hava medisinskan yvirlækna, ortopedkirurg og vitjan av ymsum serlæknum. Haraftur at hava vit eina rúgvu av dungaligum starvsfólki við nógvum royndum, sigur hann.

Umleið 150 fólk starvast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og fyristøðukvinnan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heldur, at starvsfólkini eru væl kvalifisera at veita tænastur til ein enn størri part av Føroyum.

– Okkara starvsfólk eru væl útbúgvin, og vit gera nógv við at ogna okkum servitan á teimum økjum, sum vit fáast nógv við. Vit hava til dømis tætt samstarv við Ríkissjúkrahúsið og senda javnan fólk uttanlands at fáa sær servitan. Tí er tað upplagt, at eisini eysturoyingar koma til Klaksvíkar at fáa viðgerð, sigur Jona Nielsen.

## Dagkirurgi fer at vaksa

Leiðandi yvirlæknin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi roknar við, at undirsjóvartunnilin fer at hava við sær, at ávísar viðgerðar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fara at verða meiri brúktar.

– Klaksvíkar Sjúkrahús hevur rættiliga langar royndir við ávísum viðgerðum. Eitt er dagkirurgi – tað vil siga viðgerð av sjúklingum, sum koma fastandi inn um morgunin, verða lagdir undir skurð og fara heimaftur seinni á degnum. Hetta hevur riggað sera væl, og eisini eysturoyingar og aðrir føroyingar hava havt gleði av hesari tænastu, sigur Jákup Petersen.

– Eg rokni við, at hendan tænastan fer at økjast, tá ið undirsjóvartunnilin er komin, tí tá verður tað nógv léttari at ferðast til og úr Klaksvík.

Jákup Petersen er sjálvur ortopedur, og hann hevur gjørt nógvar útskiftingar av knøum og mjadnum í Klaksvík. Hetta fer at halda fram.

– Vit hava í eina tíð havt fleiri skurðviðgerðir av hesum slagnum í Klaksvík enn vanligt, tí meðan Landssjúkrahúsið bygdi út, kundu teir ikki gera allar tær skurðviðgerðirnar, sum teir plagdu at gera, men nú útbyggingin er liðug, verður býtið aftur, sum tað plagdi at vera. Men vit hava eina langa tradition við ortopediskum skurðviðgerðum í Klaksvík, og tær koma at halda fram.



*Korosh Taheri hevur í fleiri ár verið medisinskur yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og hann hevur nógv fólk í ambulantu móttøkuni hjá sær á sjúkrahúsinum*

## Fingu sær sergreinar

Tá ið tað gjørdist møguligt hjá øllum trimum sjúkrahúsunum at fáa sær sergreinar, valdi Klaksvíkar Sjúkrahús at fáa sær sínar greinar.

– Klaksvíkar Sjúkrahús fekk sær medisinskan yvirlækna og ortoped, og síðani hava vit koyrt nógv við sergreinum. Vit hava hildið fast um medisin og ortopedi, og harafturat hava vit hava havt regluliga vitjan av serlæknum innan ymsar sergreinar, sum vit ikki hava so lætt við at røkja í Føroyum, sigur Jákup Petersen.

– Tað hevur tí í nógv ár eyðkent Klaksvíkar Sjúkrahús, at her hava verið sergreinar, og at vit í ávísum tíðarskeiðum eisini hava kunnað veitt viðgerð í ymsum subspesialitetum, sum annars ikki verða røktir í Føroyum, tí vit hava tikið serlæknar inn aðrastaðni frá.

Jákup Petersen stúrir ikki fyri, at tað verða dupultfunktiónir í føroyska sjúkrahúsinum, um samstarvið millum sjúkrahúsini